## Sløkkiliðsfólk til Fuglafjarðar sløkkilið

Fuglafjarðar kommuna søkir hervið eftir 1 leysum sløkkiliðsfólki M/K til Fuglafjarðar sløkkilið til setan 1. november 2007 ella skjótast eftir hetta.

Sum treyt verður sett, at viðkomandi skulu hava heilsuváttan, revsiváttan og stóra koyrikortið. Tó kunnu persónar, sum ikki lúka krøvini fyri koyrikorti, søkja størvini við teirri treyt, at hetta verður fingið til vega skjótast, um teir verða settir í starv.

Somuleiðis verður kravt, at umsøkjarar antin hava ella skulu taka neyðugt grundskeið í 1. hjálp. Neyðuga víðari útbúgving sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsfólkum skipar Fuglafjarðar sløkkilið fyri.

Nærri upplýsningar um starvið eru at fáa frá brunastjóranum William S. Askham á telefon 737800.

Møguligar umsóknir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi **28. september 2007 kl. 15.00.**

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 07. september 2007*
**Fuglafjarðar kommuna**

## Hagafundur í Ognarhaganum í Kvívík

Lýst verður til hagafundar í Ognarhaganum í Kvívík 26. september 2007, kl. 19.30 í Glæmuni.

**Skrá:**

Støðutakan til umsóknina frá Grækaris A. Joensen um sølu av jørð Frammi í Gerði til útstykkingar til íbúðarendamál.

Gjørt verður vart við, at tann, sum møtir fyri annan, skal hava skrivliga fulltrú at møta og atkvøða. Hetta er eisini galdandi fyri tey, sum møta fyri medeigarar av somu ogn. Tað merkir, at eiga fleiri persónar eitt matrikul nummar, atkvøða teir hvør sær bert fyri sín part, um so er, at teir ikki hava skrivliga fulltrú frá hinum.

**Hagastýrið**

## Suðuroyar Tjóðveldisfelag

2. og møguliga 3. uppstillingarfundur verður í Naddoddaneystinum sunnudagin 16. september 2007 kl. 17:30

**Nevndin**

## Størv sum havnaumsjónarmenn við Fuglafjarðar havn

2 størv sum havnaumsjónarmenn við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leys til setan tann **01. november 2007** ella so skjótt sum til ber eftir hetta.

**Førleikakrøv:** Útbúgving sum navigatørur og førleika í enskum máli bæði í skrift og talu, somuleiðis sum tú skal duga at orða teg væl bæði munnliga og skrivliga í føroyskum máli og haraftrat hava teldukunnleika á brúkarastøði.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi starv, har tú eisini saman við leiðsluni fær møguleikar fyri at menna havnina.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Skipara- & Navigatørfelag fyri havnaumsjónarmenn, somuleiðis sum skrivligur sáttmáli verður gjørdur partanna millum um arbeiðstreytir vm.

**Starvstreytir:** Umsøkjararar við royndum innan sjóvinnu hava fyrimun.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

**Hevur tú áhuga**
so ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til **Fuglafjarðar kommunu**, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða kommununi í hendi í seinasta lagi **mikudagin 03. oktober 2007 kl. 16.00.**

**Fleiri upplýsningar**
Um starvið fáast við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 737777 ella til Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702.

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir ella eisini onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 12. september 2007*
**Fuglafjarðar kommuna**



## LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo

## Lærarastarv í Fuglafjarðar skúla

Søkt verður eftir lærara at undirvísa gentu við Down- syndromi 21 tímar um vikuna. Vónandi kunnu møguligir umsøkjarar byrja sum skjótast ella í seinasta lagi 8. oktober.

**Søkt verður eftir lærara, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- er fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- er stundisligir og nærlagdir

**Førleikakrøv:**
Tann, ið verður settur í lærarastarvið, skal hava læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum. Fyrimunur er eisini, um ømsøkjarin hevur royndir at undirvísa næmingum við serligum tørvi.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 28. sept kl. 10**

Setanarsamrøður verða í døgunum 28. sept.- 1. oktober.

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til skúlastjóran ella varaskúlastjóran á tlf. 737760, 737761 ella 737762. Eisini ber til at senda teldupost til skúlastjóran: suni@ffs.fo

**Fuglafjarðar skúli** hevur í løtuni umleið 320 næmingar í 18 flokkum. Við skúlan starvast 33 lærarar, 3 stuðlar, 1 skrivari, 1 húsavørður og 4-5 reingerðingarfólk.
Í hesum skúlaárinum fer skúlin at arbeiða við at seta í verk fleiri menningarætlanir.
Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo

**Fuglafjarðar skúli**
Postboks 9
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 737760

## DVEYLAN
### Alt inna reigerð



**Rina á tlf. 214175**